Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Help 10:30 Outlook Express

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Indbakke

Jógvan Hugo Gardar, Oslo, e-post:gardar@oslo.online.no
Dagur 21.02.01
til: birgir@sosialurin.fo
Evni: Teldupostur

TELDUBRÆVIÐ

# Mammur gera uppreistur

Vit hava sæð mótmælisgongurnar í Seattle, Prag og Nice hesi seinastu árini. Ongantíð í søguni hava vit sæð so stórar mannamúgvur savnast fyri at vísa sína misnøgd við tey sum stýra. Bankar, politikkarar og pengasnillingar fáa toyggið fyri at byggja eitt samfelag, sum umfatar øll. Hesar mótmælisgongur hava ikki verið skipaðar av ávísum politiskum bólkum. Hetta hevur verið ein tvørpolitiskur hópur sum hevur víst sína misnøgd. Fólk krevja eina nýggja kós - burtur frá privatisering og yvirskotshugsan. Tað eru onnur krøv enn bert fíggjarligt yvirskot, sum skal avgera, um omma skal sleppa á ellisheim ella ikki.

Tann rørslan, sum veksur skjótast í heiminum í dag, er Attac, sum er best kend frá Prag-, Nice- og Seattle-fundunum. Attac hevur sín uppruna í Frankaríki. Tað serliga við hesi rørslu er, at hon ikki er politiskt tengd at ávísum flokkum, ella hugsunarháttum. Attac hevur savnað túsundtals fólk til fundir í Svøríki seinastu vikurnar. Fólk streyma til fundirnar, og fyrireikararnir kunnu fortelja, at fundarhallirnar eru á tremur. Tá fyrireikararnir rokna við í mesta lagi 50 áhoyrarum, so koma minst tvey hundrað. Úr Danmark hoyra vit um somu uppmøting. Attac fær sínar donsku og norsku greinar í komandi viku.

Men óheft av Attac so hava tvær vinkonur úr Vadsø í Norður-Noregi sett ein álvarsligan støkk í norskar politikarar. Uttan at hava Attac-hugsjónina í huganum, hava tær sett í gongd eina rørslu, sum er átøk Attac.

Tær báðar vinkonurnar í tríati árunum hittust til ein kaffimunn fyrst í desember 2000. Prátið kom inn á hvussu landið og samfelagið verður stýrt. Og tá tær taldu almenn arbeiðspláss og tilboð, sum vóru horvin úr býnum, hesi seinastu árini, blivu tær í øðini. Almennir stovnar flyta úr bygd til bý, og pengafólk og fyritøkur seta ikki pengar í bygdir, sum tað almenna flýggjar frá.

Í dag knappar tríggjar mánaðir seinni eru tær oddakvinnur fyri Folkeopprøret i Finnmark. Til ein fyrireikandi fund møttu næstan 400 fólk. Mánadagin kemur Jens Stoltenberg til Vadsø, og tá verður lokala høllin á tremur við fólkið, sum vilja hava hann at broyta kós.

- Vit vilja hava rætt til at búgva her, og vit krevja, at samfelagið bjóðar okkum somu vælferðartilboð sum fólk í Oslo og stórbýunum fáa. Vit skulu noyða javnaðarflokkin burturfrá fjeppingini uppí stórkapitalinum, søgdu tær, tá eg hitti tær um vikuskifti. Tær ákæra Jens Stoltenberg, Tony Blair, Poul Nyrup Rasmussen og aðrar stjórnarleiðarar fyri ikki at hugsa um tann vanliga borgaran. Alt handlar um pengar og yvirskot - eitt trygt vælferðartilboð til fólkið hava hesir jassar gloymt hvat er, meina tær.

Teir flestu politisku flokkarnir hava verið á fríggjaraferð. Teir vilja vita um ikki hesar uppreistrarsinnaðu kvinnurnar vilja gerast ein partur av flokkunum, og so vilja flokkarnir gjarna vita, hvat tað er, sum lokkar fólk til hesa rørslu.

- Eg fái dagliga telefonboð frá leiðandi politikarumn. Teir ringja tíðliga og seint, spyrja hvussu gongur, hvat eg gerið og so framvegis. Leiðandi politikkarar innan javnaðarflokkin ringja í dag til mín, sum um vit vóru gamlar vinkonur - hóast tær ikki vistu hvør eg var fyri fáum vikum síðani, sigur annar av stigtakarunum, Torill Olsen.

Tær hava serliga vent kanónunum móti javnaðarflokkinum tí hesin hevur sitið leingi - og situr enn - við maktina í Noregi. Tær ákæra politikkararnar fyri at hava gloymt tann vanliga borgaran í jakstranini eftir at fáa yvirskot í landskassan. Tær eru í øðini tí almennir stovnar lata aftur í útjaðaranum og flyta arbeiðsplássini til stórbýirnar, sum frammundan hava ov lítið av arbeiðsførum fólki.

Norska stjórnin arbeiðir við at finna loysnir uppá brúk av risainntøkunum frá oljuvinnuni, sum dagliga fossa inn á kontoina hjá Norges Bank. Fyri at fáa góð hugskot, so hevur fíggjarmálaráðharrin, Karl Eirik Schjøtt-Pedersen, sum sjálvur er úr Finnmark, bjóða góðum fólki til døgverða. Vinnulívstoppar og millióningar hava verið inni á gólvinum og givið Schjøtt-Pedersen ráð. Hetta fall kvinnunum í Vadsø tungt fyri brósti. Ikki at hann bjóðar hesum at koma við ráðum, men at hann fullkomiliga hevur latid vera við at spyrja verkafólk, hvat tey halda.

Folkeopprøret i Finnmark lovar, at várið í Noregi kemur at handla um, hvat politikkararnir gera fyri bygdirnar, og tær vilja samla tíggjutúsundtals norðmenn frammanfyri Stórtinginum beint áðrenn valið í september - um ikki nakað munagott verður gjørt fyri bygdirnar og teir vanligu borgararnar.

# Telduspøl



SJÓNARMIÐ
*Elinborg Joensen*

Eitt av telduspølunum, sum er nógv frammi nú, er Tomb Raider. Høvuðsleiklutin hevur tann kvinnuliga actionhetjan Lara Croft. Júst hetta, at ein kvinna hevur høvuðsleiklutin í einum telduspæli, fangar hugflogið. Er tað tí, at málbólkurin er dreingir? Helst. Tað eru nevniliga serliga dreingir millum 12 og 20 ár, sum eru áhugaðir í spælinum.

Tað eru eini 4-5 útgávur av Tomb Raider. Sum flest onnur telduspøl, er spælið trídimenisionelt. Tað gongur fyri seg á ymiskum veruligum støðum, t.d. byrjar 2´arin við, at Lara Croft er á tí kinesiska múrinum. Haðani kemur hon til Venesia, har hon møtir mótstøðu, ið vil steðga hennara missión. Spælið er býtt upp í fleiri partar, har hon fer gjøgnum ymiskar royndir. Í 3´arinum eru 5 partar, har tað byrjar í India og endar á Suðurpólinum. Raðfylgjuna gert tú sjálvur av.

Eisini eru fleiri mátar at klára hvønn part, onkur lættur og annar verri. Men meira spenningur kemur í, um tú velur tann verra vegin. Grafikkurin í 3´arinum er betri enn í 2´arinum, við tað, at tú t.d. sært roykin úr revolvaranum tá tú skjýtur. Ljóðeffektirnar gera eisini sítt til, at spælið verður meira spennandi.

Eisini er ein filmur um Tomb Raider á veg. Høvuðsleiklutin sum Lara Croft hevur Angelina Jolie. So tað er kanska okkurt at gleða seg til, hjá teimum mongu fjepparunum! Jú, vit mugu sanna, at telduspøl rættiliga hava gjørt vart við seg hjá tí unga ættarliðnum. Men tað eru ikki bert tey 10 ára gomlu, sum spæla telduspøl aftaná skúlatíð. Eisini teimum 25 ára gomlu, og kanska eldri, dámar væl at seta seg eina løtu framman fyri skíggjan.

Vit kunnu kanska undrast á, at vaksin fólk tíma at spæla sovorðið. Tey eru jú ikki vaksin upp í eini telduverð, sum børnini í dag. Tey spældu Ludo, talv, kort o.a. Men júst hetta kann vera orsøkin. Tey vilja royna tað, sum tey ikki høvdu møguleikan til, tá tey vóru yngri.

So kann ein spyrja, hvussu sosialt tað er at sita framman fyri skíggjan, ístaðin fyri at spæla kort. Tá eru tað jú fleiri, sum spæla saman, meðan telduspølini eru meira asosial. Men tað er ikki neyðugt at sita einsamallur og spæla teldu. Sjálvt um tú fysiskt ert einsamallur, er alnótin eitt hent amboð — eisini hesum viðvíkjandi. Tú kanst sum einki spæla ímóti einum polakki, amerikumanni ella einum innføddum indiánara. Um tú bert hevur eina teldu, kanst tú vera næstan allastaðni ísenn.



*Lara Croft,*
*skotklár*
*í Tomb Raider*

Men hvat siga foreldrini? Vilja tey hava børnini at spæla teldu, ella krógva og blunda? Geva foreldrini barni sínum eitt telduspæl, tí tað ikki sleppur í frítíðarskúla, og tískil einki hevur at gera eftir skúlatíð? Vóru familjurnar betur samansjóðaðar áðrenn telduna?

Hvussu er og ikki, so trúgvi eg, at teldan er komin fyri at vera. So er tað bertuppgávan hjá foreldrunum at avgera, hvussu nógva tíð barn teirra nýtir til teldur og telduspøl.







Sosialurin -har tað hendir



Stóra bringu -ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

SKEMT 2000

fæst í sølubúðunum kring alt landið
Kostnaður 120,-





Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-

Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20

Sosialurin - 311820


Almanna- og Heilsumálastýrið
*Starvsfólkadeildin*

## Landssjúkrahúsið

**Húsavørðurin**
**FO-100 Tórshavn**

Til Húsavørðin verður søkt eftir einum tímaløntum búnum arbeiðsfólki at byrja 1. apríl 2001 ella eftir avtalu.

**Starvsinnihald**
Starvið umfatar fyrifallandi inni- og útiarbeiði til tíðir tungt arbeiði. Viðkomandi skal hava tað stóra koyrikortið.

**Starvstreytir**
Løn sambært sáttmálan við avvarandi fakfelag.

**Upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Gorm Justinussen, leiðara, tlf. 313540, lokal 278.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um arbeiðsroyndir og møgulig viðmæli skal sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

Umsóknarfreistin er 12. mars 2001 kl. 12.00

## Frá Klaksvíkar Róðrarfelag

Aðalfundur verður í hølum felagsins leygardagin 03. mars kl. 15.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

## Aðalfundur

Diabetesfelag Føroya hevur aðalfund á Hotel Hafnia sunnudagin 11. mars kl. 15.00.

Skrá sambært $ 5 í viðtøkum felagsins.

Byrjað verður við at Rúna Nolsøe, granskari, hevur fyrilestur um gengransking.

**Diabetesfelag Føroya**

## Aðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Føroya Blaðmannafelag verður hildin í Pæsastovu leygardagin 10. mars klokkan 18.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**